# Gullið til Klaksvíkar sunnudagin

Kvinnurnar hjá KÍ hava aftur í ár verið mest sum einaráðandi, og nú eru tær bara ein dyst frá gullinum. Hóast fimm umfør eru eftir at spæla í bestu deildini, so er munurin millum KÍ og næst besta liðið – Víkingur – longu 14 stig, og tí kunnu tær vissa sær gullið, um tær vinna útidystin móti AB sunnudagin



# Seinasta kastikapping í ár

Komandi leygardag fer síðsta kastikapping hetta kappingarárið av bakkastokki á kastivøllinum við Eysturskúlan. Kappast verður í Kasti 5-kampi og vektkast. Hetta verður vænta ndi eisini seinasta kapping á hesum vøllinum, sum hevur verði einasti kastivøllur í landinum síðan 1999. Kappingin byrjar klokkan 14 við hamarkast, síðan verður raðfylgjan kúlustoyt, diskuskast, spjótkast og at enda vektkast. Stig verða givin í hvørjari grein eftir altjóða stigatalvu, og tann sum hevur flest stig tilsamans hjá ávikavist kvinnum og monnum verður føroyarmeistari. Tann sum kastar vektina longst hjá ávikavist kvinnum og monnum verður føroyameistari í hesi grein.

KÍ-HB:

# 104 ára dagur á høkjum



*Føðingardagur er í Klaksvík sunnudagin. Og einki er at ivast í, at klaksvíkingar vóna, at karmarnir til føðingardagin verða hugaligari, enn teir hava verið seinastu vikurnar*

**KÍ fyllur 104 ár sunnudagin. Men standurin á føðingardagsbarninum hevur ofta verið betri, enn hann er í løtuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við bara tveimum stigum niður til skeivu síðuna av niðurflytingarstrikuni er einki at taka seg aftur í, at KÍ hevur knívin á barkanum, tá teir taka móti HB sunnudagin.

Bara tað í sjálvum sær er helst nóg mikið til at motivera klaksvíkingar. At talan so eisini er um dyst móti arvafíggindanum og á 104 ára degnum hjá KÍ ger neyvan motivatiónina minni.

Tað verður tó uttan Heðin á Lakjuni, at KÍ skal standa seg. Hann fekk reytt kort í tapinum móti Víkingi seinast, og tí er hann leikbannaður. Hinvegin er Ovi Nysted nú um at koma fyri seg eftir skaða, eins og John Hammer er komin ígongd aftur, eftir at hann hevur verið burtur frá eina tíð.

Hjá HB vóna tey, at formkurvan er um at venda rætta vegin eftir sigurin móti EB/Streymi. Eingi leikbann gera um seg í hópinum, sum tí helst verður á leið tann sami, sum hann var fyri viku síðani. Tó er møguligt, at Christian Restorff Mouritsen hesa ferð fær dystarvenjing við teimum næstbestu í 1. deild, og kanska verður Ólavur S. í Ólavsstovu tøkur, eftir at hann hevur verið darvaður av skaða.

B36-Skála:

# Landslið í Lazarett

**Hjá B36 eru fýra týðandi spælarar á skaðalistanum undan uppgerðini móti Skála, sum spælir finalu mest sum hvørja ferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrstu árini í fremstu røð í føroyskum fótbólti gjørdi Skála sær til sergrein at bjarga tilveruni í evstu løtu.

Og skal liðið eisini spæla Formula-fótbólt næsta ár, verður skjótt neyðugt at gera ein »Skála«.

Hesa ferð verður tað á útivølli móti B36, at John Petersen og hansara menn skulu royna seg, og eftir 1-1 javnleikin móti NSÍ eru vónirnar helst ikki heilt ongar.

Tað er tó ivasamt, um Skála hevur Boga Gregersen við í hópinum sunnudagin. Hann noyddist av vøllinum við skaða seinast, og enn tykist hann ikki vera komin fyri. Pauli G. Hansen noyddist eisini av vøllinum í tí dystinum, men hann verður væntandi tøkur aftur sunnudagin.

Hjá B36 er skaðalistin drúgvur í løtuni. Ingi Højsted hevur verið skaðaplágaður alt árið. Hann hevur spælt nakað síðani í summar, men nú er knæið aftur farið at arga, skilst.

Súni Olsen brákaði eitt bein í fótinum longu í sínum næsta dysti fyri B36, og hann er enn ikki tøkur, og tað er nýggi álopsspælarin, Sam Malson, heldur ikki. Hann hevur bruna í skinnabeininum. Hinvegin verður vónað, at Hanus Thorleifsson er førur fyri at spæla. Eisini hann hevur drigist við skaða, men tað verður vónaða, at hann kortini er til reiðar at tørna út sunnudagin.

B71-EB/Streymur:

# Botnlið við sjálvsálitið

**Hóast talan er um botn móti toppi, so hevur gongdin hjá B71 verið væl betur, enn hon hevur verið hjá EB/Streymi seinastu tíðina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Skal gangast eftir stigatalvuni, er EB/Streymur greiður favorittur. Men gongdin seinastu umførini sigur nakað heilt annað*

Á formbarometrinum, sum vit høvdu á hesum síðum mánadagin, var EB/Streymur aftast liðið. Millum annað hevur oddaliðið í Formula-deildini tapt fýra útidystir á rað, og tað er ein gongd, sum helst skal vendast, um teir ikki skulu trýstast alt ov nógv av hinum liðunum í Formula-deildini.

Til dystin á Sandi kundi Sigfríður Clementsen, venjari, tó helst ynskt sær betri umstøður til fyrireikingar. Ikki færri enn seks av spælarunum vóru partur av landsliðshópinum, summikukvøldið var í Portugal, og tí verður tað ikki fyrr enn fríggjadagin, at hópurin er savnaður til venjing.

Hinvegin kann Sigfríður fegnast um, at allir seks landsliðsspælararnir koma skaðafríir heimaftur. Framman undan er greitt, at Marni Djurhuus er leikbannaður og Brian Olsen er skaddur, og tí eru ikki ráð at geva nógv meira enn tað sama burtur av hópinum.

Hjá B71 hevur gongdin seinastu vikurnar verið tann øvuta. Á formbarometrinum fyri seinastu seks dystirnar er B71 í løtuni næst ovasta liðið, og tí er sjálvsálitið í hæddini. Eisini tí teir hava spælt javnt tær báðar ferðirnar, sum EB/Streymur í ár hevur vitjað á Sandi.

Til dystin noyðist B71 tó at vera stórspælandi Gudmund S. Nielsen fyriuttan, eftir at hann fekk sítt fimta gula kort seinast. Hinvegin er Símin Hansen til reiðar at spæla, eftir at hann hevur sitið leikbann av sær. Skaðar tykjast tey ikki kenna til á Sandi í løtuni.